# Skúmparty í Klubbagarðinum

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Lot til andøvsgul av landnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar. Um kvøldið møguliga regn. Hitin millum 11 og 14 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Fleyr til gul av ymsum ættum, um kvøldið mest av eystri. Regn av og á og hitin millum 10 og 13 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Gul til stívt andøvsgul av norði og regn av og á. Hitin millum 10 og 13 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útsynningi og ælingur, men onkur sólglotti. Hitin millum 8 og 12 stig.

**Tað vóru fólk úr Eclips í Klubbanum í Havn, sum fríggjadagin fyltu Klubbagarðin við skúmi. Hetta var ein forsmakkur upp á skúmparty leygarkvøldið**



*Meðan børnini hugnaður sær í skúminum í Klubbagarðinum leygardagin, vóru tað tey ungu, ið sluppa at dansa – og fáa sær karm – í skúminum í dansistaðnum Eclips leygarkvøldið*

### SKÚMPARTY

Myndin omanfyri kundi næstan tað sama verið tikin í kavaveðri, men so er ikki. Hon er tikin í Klubbagarðinum við Tinghúsvegin í Havn seinasta fríggjadag. Tað vóru fólk frá dansistaðnum Eclips, sum høvdu sett upp eina skúmmaskinu, sum nærum fylit Klubbagarðin við skúmi.

Kanska var tað fyri at royna útgerðina, sum skuldi nýtast í Eclips leygarkvøldið – ella var tað kanska tí, at Barometrið sendi beinleiðis úr Klubbagarðinum hendan góðveðurs seinnapartin.

Men nógv fólk hugdu framvið – og tað var ikki frítt, at fleiri børn og ungfólk fingu karm í skúminum, meðan onnur royndu at sms'a seg til eina fartelefon í Barometrinum.

Eyðkendi verturin, Heri Jacobsen, sum annars ikki hevur verið við í seinastu Barometursendingunum var aftur og gjørdi seg upp – kanska hann hevði frí frá læraragerninginum hendan seinnapartin.

Leygarkvøldið var skúmmaskinan nýtt í dansinum í Eclips. Sagt verður, at hetta riggaði sera væl – og fólk hugnaði sær ófør.

Fyrireikararnir høvdu ávara fólk móti at verða í skinnklæðum ella skinnskóm frammanundan – og fleiri høvdu lurtað, tí onkrar gentur møttu upp í bikini.

Hugtakið við skúmparty er sera væl umtókt aðrastaðni. Vit hava frætt, at Eclips hevur ognað sær skúmmaskinuna, so hon verður uttan iva aftur at síggja á ymsum tiltøkum.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 8 |
| Nuuk | 5 |
| Qaqortoq | 8 |
| Ammassalik | 7 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | 13 |
| Seyðisfjørður | 11 |
| Tórshavn | 11 |
| Lerwick | 13 |
| Aberdeen | 15 |
| London | 19 |
| Tromsø | – |
| Bergen | – |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | – |
| Keypmannah. | 18 |
| Helsinki | 15 |
| Moskva | 17 |
| Berlin | 21 |
| Warzawa | 19 |
| Kiev | 18 |
| Bukarest | 22 |
| Paris | 24 |
| Madrid | 30 |
| Róm | – |
| Malorca | 32 |
| Athen | 29 |
| Malta | 27 |
| Tunis | 30 |
| Beijing | 27 |
| New Dehli | 27 |
| Bangkok | 33 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 20 |
| New York | 27 |
| Miami | 30 |
| Los Angeles | 21 |
| Meksikobýur | 21 |
| Panama | – |
| La Paz | 9 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 15 |

### LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 1003 hPa. yvir Írlandi fer eystureftir og dýpist. Ein hátrýstryggur, 1016 hPa. yvir Norska Havinum mennist nakað.




Lágtrýstið yvir Jyllandi fer spakuliga eysturefftir. Eitt brúgvalag vestan fyri Føroyar kemur hendavegin.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 23/08 kl. $06^{00}$–24/08 kl. $06^{00}$. Hitin í gjár: 10,9°
Minsti hiti máldur í aug.: 0,2° - Mesti hiti máldur í aug.: 22,0°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 0,7 mm – mált frá 23/08 kl. $06^{00}$–24/08 kl. $06^{00}$
Avfallið higartil í august: 24,0 mm


I EINUM SAMFELAG HAR TEY VEIKASTU HAVA TAÐ GOTT, HAVA ØLL TAÐ GOTT

WWW.JAVNI.FO

JAVNI


### VESTFALLSKYRRINDI

23. aug.: Fyrra kvarter
27. aug.: Mánin næstur jørðini
30. aug.: Fullmáni

Kelda. Álmanakkin 2004

| | Suðuroyar-/ Vágafirði | | Skúvoyar-/ Skopunarfirði | | Hestfirði/ Sundalagnum | | Vestmanna-sundi | | Mykines-firði | | Nólsoyar-firði | | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi | | Leirvíksfirði/ Haraldssundi | | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði | | Hvanna-sundi | | Fugloyar-firði | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Dagur | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. |
| 25. aug | 03.00 | 15.29 | 02.00 | 14.29 | 02.15 | 14.44 | 05.00 | 17.29 | 06.00 | 18.29 | 01.15 | 13.44 | 00.15 | 12.44 | 03.15 | 15.44 | 04.15 | 16.44 | 02.45 | 15.14 | 04.00 | 16.29 |
| 26. aug | 03.58 | 16.26 | 02.58 | 15.26 | 03.13 | 15.41 | 05.58 | 18.26 | 06.58 | 19.26 | 02.13 | 14.41 | 01.13 | 13.41 | 04.13 | 16.41 | 05.13 | 17.41 | 03.43 | 16.11 | 04.58 | 17.26 |
| 27. aug | 04.55 | 17.23 | 03.55 | 16.23 | 04.10 | 16.38 | 06.55 | 19.23 | 07.55 | 20.23 | 03.10 | 15.38 | 02.10 | 14.38 | 05.10 | 17.38 | 06.10 | 18.38 | 04.40 | 17.08 | 05.55 | 18.23 |
| 28. aug | 05.51 | 18.19 | 04.51 | 17.19 | 05.06 | 17.34 | 07.51 | 20.19 | 08.51 | 21.19 | 04.06 | 16.34 | 03.06 | 15.34 | 06.06 | 18.34 | 07.06 | 19.34 | 05.36 | 18.04 | 06.51 | 19.19 |

5 707265 100036 >